# Eik Banki á børsin

**Fyrra hálvár í ár verður Eik Banki skrásettur bæði á Virðisbrævamarknaði Føroya og á virðisbrævamarknaðinum í Keypmannahavn**

FÍGGJARVINNA
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

2007 verður eitt hendingaríkt ár innan føroyska fíggjarheimin og ikki minst í Føroya størsta banka, Eik Banka.

Eik Banki fyllir 175 ár, og tað er í sjálvum sær ein stórur tilburður í søguni hjá fyritøkuni. Í jubilæumsárinum er ein onnur stórhending børsskrásetingin av fyritøkuni.

### Tvískráseting

Børsskrásetingin av Eik Banka nærkast í hvørjum. Bankin hevur áður boðað frá, at hann fer á børsin fyrra hálvár 2007, og nú hevur Eik eisini tikið avgerð um tvískráseting.

Tað merkir í stuttum, at Eik-partabrøv eftir skrásetingina seinni í ár bæði kunnu handlast á Virðisbrævamarknaði Føroya (VMF), ið er partur av íslendska virðisbrævamarknaðinum, og á virðisbrævamarknaðinum í Keypmannahavn.

### Størri sjónligheit og atgongd til kapital

”Avgerðin um tvískráseting merkir, at Eik heldur fast um skrásetingina á VMF og samstundis fær nýggjar møguleikar á danska marknaðinum. Virksemið í Danmark er stórt, serliga umvegis dótturbankan í Keypmanna-havn, og við skrásetingini í Keypmannahavn økist sjónligheit okkara í Danmark. Avgerðin um tvískráseting kann stuðla undir vaksandi virksemið, tí áhugin hjá donskum íleggjarum fyri Eik-partabrævinum gerst helst størri, um Eik Banki eisini er skrásettur í Keypmannahavn”, sigur Marner Jacobsen, forstjóri í Eik.



*2007 er søguligt ár í Eik Banka. 175 ár eru liðin síðani stovningina í 1832, og í ár verður Føroya fyrsti og størsti banki skrásettur á Virðisbrævamarknaði Føroya og Københavns Fondsbørs.*

Í Bátatænastuni starvast í dag 4 fólk, og hesi syrgja fyri at veita útróðra- og bátafólki í Føroyum eina góða tænastu. Bátatænastan man vera mest kend fyri at umboða Volvo Penta, og nógv onnur umboð - millum annað Mariner, Cetrek, Lorenz, C-map, Humminbird, Baltic. Úrvalið hjá Bátatænastuni er ídag so stórt, at so at siga alt innan bátaútgerð fæst her.

www.batataenastan.fo




VOLVO PENTA

Báta- og skipsmotorar
til øll endamál

BÁTATÆNASTAN
Gríms Kambansgøta 4 · Postsmoga 101
FO-110 Tórshavn · Tel 31 17 35 · Fax 31 38 35